# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur -**
**1. sunnudag e. trettanda**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Bjarni Bæk
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11, Lestur, cand. teol. Ann Hansen
***Kaldbak:*** kl. 12 Sonja Klein, altargangur
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Hanus Simonsen
***Argir:*** kl. 11, Heri Joensen
***Miðvágur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen
***Vestmanna:*** kl. 11, Inga Poulsen Dam
***Hvalvík:*** kl. 12, Mogens Tilsted Christensen
***Søldarfjørður:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altargangur.
***Tjørnuvík:*** kl. 12 Theodor E. D. Olsen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11 Lestur. ***Talvan gongur fyri Sunnudagsblaðið***
***Gøta:*** kl. 12 Lestur. ***Talvan gongur fyri Bíbliufelagið***
***Funningsfjørður:*** kl. 16, altarg., Uni Næs
***Leirvík:*** kl. 12, Uni Næs
***Árnafjørður:*** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen
***Viðareiði:*** kl. 12, altarg., Elsa Funding
***Skálavík:*** kl. 12, altargongd: Jákup R. Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11 Símun Jacobsen
***Hvalba:*** kl. 12.30 Símun Jacobsen
***Øravík:*** kl. 14, familju og barnagudstænasta, Jónsvein Bech.
***Vágur:*** kl. 11 + dåb.
***Porkeri:*** kl. 12 + altergang, Patrick de Neergaard

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Kl. 11 gudst. Jens V. Danielsen.

**Katólska Kirkjan**
Fríggjadagin kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Torsten Jortzick, prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
www.katolsk.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 14. januar kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman við Hjørleivi Poulsen, Klaksvík.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing-kórið venur.
Hósdagin í KFUK: Bíbliutími við Jenny Lydersen og Selmar Jacobsen.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Sunnudagin kl. 11 guðstænasta, v/Hendrik T. Olsen,
kl. 12 sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 17.15-18 venur barnakórið, kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
http://www.oasan.fo

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, evnið er »Nýtt ár við teimum ungu« Dánjal Petersen talar.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti har Poul Guttesen talar.
Undir báðum møtinum verður barnaansing.
kl. 12 Sunndagsskúli
Týskvøldið verður møti kl. 20 á Brekku, Poul Guttsen undirvísir um »Bønarlív Jesusar".
www.livdin.fo

**Sjómanskvinnuringurin í Tórshavn.**
Vit koma saman á hotel Tórshavn mánadagin kl.19.30.

**Missiónshúsið v/Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Ásu og Poul Kristoffur Joensen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20.00 Felagsbøn í Filadelfia.
Leygardagin kl. 10 Felags bønardagur í Evangeliihúsinum, kl. 21.00 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Felags møti í Filadelfia, kl. 11.50 Felagsbarnagudstænasta
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin í Evangeliihúsinum.
www.filadelfia.fo

**Aglow, Havn**
Leygarkvøldið 12. januar kl. 19.30 møti fyri kvinnur í Evangeliihúsinum. Annefía Mellemgaard luttekur við vitnisburði og sangi.
http://www.aglow.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 13. januar
Kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30 Samvera við drekka.
Kl. 12.00 Sunnudagsskúli og møti. Á møtinum talar Súni S. Jacobsen
Mánadagin 14. jan. kl. 19-21 BeTvix. Tiltak fyri ung í aldrinum 5. - 8. flokkur. Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli,
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 møti har Palli Petersen talar.
Sunnudagsskúli kl. 14, øll børn eru vælkomin.
Møti verður kl. 18,00. suppa, sápa og frelsa síðan 1865.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Fríggjadagin kl. 20 Heimsbønarvika.
Leygardagin kl. 20 Heimsbønarvika.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v. Jóhan Hendriksen, evni: Tempul í gamla testamenti. Barbara Petersen syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og sjónvarpsmøti kl. 18. Drekka aftaná.
Hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14, einki møti verður vegna missiónsviku í Kvívík.
Bíbiltími týskvøldið kl. 20
Bønarløta hóskvøldi› kl. 19.30
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónsvika í Glæmuni í Kvívík 10. – 13. jan. 2008**
Fríggjadagur 11. januar, kl. 20 Møti við Haldu Dalbø úr Gøtu, Poula og Jóannes Fonsdal syngja.
Leygardagur 12. januar, kl. 20 Møti við Regini Høgnesen úr Leirvík, Manskór úr Leirvík syngur.
Sunnudagur 13. januar, kl. 18 Møti við Reimund Langgaard o.fl. Øll eru vælkomin.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Sunnudagin 13/1 - morgunmøti við breyðbróting klokkan 11.
Verið vælkomin.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudags skúli verður sunnudagin kl. 14.30 og møti kl. 18.00 við John Myllhamar úr Sandavági. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Berøa Saltangará**
Leygardag kl. 20 - 23 »Løta fyri ung« frá 6. flokki og eldri.
Sunnudag kl. 11.30 breyðbróting og sunnudagsskúli.
kl. 18.00 Evangeliskt møti við John Færø og fleiri.
Mikudagin Bønar og uppbyggingarmøti.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Frits Thomsen.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 19 møti við Frits Thomsen.
Øll hjartaliga vælkomin
Mánakvøldið kl. 19.30 verður sjómanskvinnuringur.
Allar kvinnur vælkomnar.

**Nerija á Skála**
Nýggjársveitslan verður leygardagin kl. 17.
Øll eru vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur 11. jan. kl. 21 Ungdómsmøti – Glyvra praise
Sunnudagur kl. 17 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti v/Egil Olsen, Saltangará.
Mikumorgun kl. 6 Bøn, kl. 20 Bíbiltími
Hósdagur 17. jan. kl. 20 Bønarløta.
Øll eru hjartaliga væl komin.
Vikuskiftið 25. – 27. januar 2008 skipar Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum fyri bygdalegu í Nesvík, øll eru hjartaliga væl komin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 21, Bøn og lovsangur.
Leygarkvøldið kl. 21, Awake.
Sunnudagin kl. 11, Morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
kemur saman í Kvinnufelagshúsium mánakvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið Karmel, Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti v/ Egil Joensen.

**Thabor, Fuglafjørður**
Bønarmøti er hvørt kvøld í vikuni kl. 19.30.
Sunnudagsskúlin er í kirkjutíð kl. 12 í kirkjukjallarinum. Møti verður sunnukvøldið kl. 18. John Petersen talar.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin 13. jan. Sunnudagsskúli, kl. 14. Barnakórið venur eftir sunnudagsskúlan.
Bønarmøti kl. 17.30.
Sjómansmøti kl. 18, Regin Høgnessen talar og Streingjakórið í húsinum syngur.
Náttturði aftana.
Ungdómsmøti kl. 21. Øll hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl 18.00 møti v/ Thomas J. Askham.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti og bíbliutími.
Tú er hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti við Jóel & Jórun Bringsberg.
Leygarmorgun kl. 10 morgunbøn.
Sunnnudagin kl. 18 møti.
Sunnudagsskúli er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Juttu og Salli. Øll eru vælkomin.
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Op. 6. kap. Øll eru vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygarkvøldið kl. 19 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti.
Evangeliskt møti kl. 18.
Mánadagin kl. 19 Bønarmøti.
Týsdagin kl. 19 Ungdómurin kemur saman.
Mikudagin kl. 19 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 19 Bønarmøti.

**Missiónshúsið Tvøroyri**
Kl. 14 sunnudagsskúli.
Einki møti verður, vegna missiónsviku í Vági.

**Frelsunarherurin Vágur**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti og sunnudagsskúli, kl 18 evang. møti, Eingrím Holm og fleiri.

**Bethel, Vágur**
Leygardagin 12. januar kl. 20 Ungdómsmøti. Filmurin 'End og the Spear' verður vístur. Øll eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti, Lív Poulsen trúboðari í Senegal luttekur og vísir myndir. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið, Vágur**
Onki møti sunnudagin vegna missiónsviku í Porkeri.

**Betania, Porkeri**
Á familjumøtinum sunnumorgunin 13. januar kl 11, kemur Lív Poulsen, at greiða frá og vísa myndir frá trúboðararbeiði sínum í Senegal.

## Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum, ið á ymiskan hátt gleddu okkum og gjørdu brúdarbandsdag okkara 1.7.07 ógloymandi og so eydnuríkan. Takk til øll tykkum, ið hjálptu á ymiskan hátt.*
***Anvør og Henrik Joensen***

**Føðingar**
25. november fingu Selma við Ósagarð og Páll Clementsen, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3580 gr.

16. desember fingu Anna Hüdepohl og Martin Mouritsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3250 gr.

23. desember fingu Beinta T. Ragnarsson, Klaksvík og Finn Hansen, Nólsoy, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3500 gr.

3. januar fingu Lena og Kári Dam, Norðskáli, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2850 gr.

5. januar fingu Gudny og Rodmund Magnussen, Signabøur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3950 gr.

5. januar fingu Gurli S. Joensen, Miðvágur og Vilhelm Hansen, Sandavágur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3625 gr.

7. januar fingu Unn Paturson og Rógvi á Rógvu, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3900 gr.

9. januar fingu Bjørg Arge og Magnus Myrdal Hentze, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

8. januar fingu Barbara Christophersen og Niels Uni Dam, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

**Brúdleyp**
Sunnudagin 6. januar *giftust* í Tingvallarkirkju í Íslandi Anna Husgaard Andreasen, Fuglafjørður og Torstein Friðfinnsson, Grundafirði.

Leygardagin 19. januar giftast Magni Blástein og Ena Samuelsen. Vígslan verður kl. 11 í Vestmanna kirkju. Opið hús verður í bygdarhúsinum í Kollafirði frá kl. 13-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.



15. mars kl. 15 giftast vit bæði, Hanni Højgaard & Fríðhild Kristina Hansen í Glyvra kirkju. Eftir hetta hava vit døgurða í Mentanarhúsinum í Fuglafirði kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin, við at tekna seg á 447805 ella 447511, innan 1. mars. Tað hevði glett okkum, um tit vildu hildið henda dagin saman við okkum.

**80 ár**
Sunnudagin 13. januar verður Eivind Petersen, Oyndarfjørður 80 ár. Dagurin verður hildin í skúlanum frá kl. 13.30 til kl. 18.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

15. januar fyllir Osla Dahl, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**95 ár**
Leygardagin 12. januar verður Sigrid Nicodemussen av Sandi 95 ára gomul. Hon verður burturstødd.